Skjal 9

Viðmerkingar um broyting í løgtingslóg umheimatænastu og erldrarøkt v.m.

Ergoterapeutfelagið heldur tað er gott, at man sær endurvenjing, sum ein umráðandi partur av tænastunum til borgarar eldri enn 67. Tó harmar tað felagið, at tað er upp til kommunirnar at raðfesta hvørji tilboð teirra borgarir fáa. Samstundis verður tað politisk bori fram, at tað skal styttast um innleggingartíðin á sjúkrahúsinum, og at borgarnir skulu kunnu verða longst møguligt í egnað heima. Hettar ber bert til, um borgarnir hava rætt til endurvenjing og gerandisrehabilitering,og hongur tí ikki saman við at, “kommunar kunnu seta í verk m.a. endurvenjing”.

Ergoterapeutfelagið mælir tí til, at tað ikki verður upp til kommunar um tær raðfesta endurvenjing gerandisrehabilitering, men heldur at geva borgarnum rætt til endurvegjing og gerandisvenjing, eins og man hevur gjørt í okkarar grannalondum.

Ergoterapeutfelagið

# Viðmerkingar til uppskot um løgtingslóg um almennatrygd og vælferð

§ 4 stk. 3 stendur at tvingilsnevndin skal hava 5 limir,og tað er sett nevt er frá hvørjum fakbólki hesi skulu verða. Ergoterapeutfelagið skilir ikki hví akkurát hesi fakbólkar skulu verða umboðaður. Ergoterapeutfelagið mælir til, at nevndin verður samansett, við einari meira breiðari og neyðugari vitan.

§ 29 stk 3 at borgarar, sum eru í venjing hjá Almannaverkinum skulu kunnu fáa fyribils hjálpartól. Hettar er at gera munn á borgarum, og samsvarar als ikki við at skriva verður at "tað er breið semja um, at fólk ikki skulu verða á sjúkrahúsið í langa tíð". Tað merkir at borgarir yvir 67, verða útskrivaðir til kommunar, men teir borgarir hava ikki møguleika at fáa somu sømdir, sum teir undir 67. Hettar hóast tað verður tosað so nógv um, at eldraøkið er so tungt at reka. Almannaráðið eigur at tryggja, at øll eru líka fyri lógini, sum eru líka stødd,óansæð um tey eru undir ella yvir 67.

Í § 34 skal Almannaverkið bjóða námsfrøðiliga ráðgeving til familjur við børnum við serligum tørvi. Tað er ein sann roynd, at hesar familjur hava ein stóran tørv á einari tvørfakligari ráðgeving og innsatsi. Ergoterapeutfelagið mælir tí til at hettar verður broytt til tvørfakliga ráðgeving, tí tað er í roynd og verðu tað hesar familjur hava tørv á.

Ergoterapeutfelagið